# Hans Pauli rættar skútuna uppaftur

**– Fíggjarnevndin ætlar rættiliga at seta spariknívin á bæði eldrarøktina, Landssjúkrahúsið og á serforsorgina, men Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, fekk yvirtalað samgonguna til at lata vera**

ALMANNAVERKIÐ
*Áki Bertholdsen,*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað verður ikki so galið, sum tað sær út til.

Hans Pauli Strøm. landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum hevur rættað skútuna uppaftur.

Tað kom illa við hjá honum, tá ið fíggjarnevndin álitið til fíggjarlógina fyri løgtingið.

Tá ið landsstýrið gjørdi uppskotið til fíggjsarlóg, varð stórur dentur lagdur á at raðfesta trý øki serliga høgt: Eldrarøktina, serforsorgina og Landssjúkrahúsið.

Men júst hesi trý økini hevur fíggjarnevndin skorið rættiliga nógv niður.

Fíggjarnevndin var samd um at skerja játtanina til Landssjúkrahúsið tríggjar milliónir, at skerja serforsorgina 3,5 milliónir og at kappa heilar seks milliónir av játtanini til eldrarøktina.



*Hans Pauli Strøm hevur yvirtalað samgonguna til at strika stórar sparingar bæði á Landssjúkrahúsinum, á eldraøkinum og á serforsorgini og tað er hann væl nøgdur við*

Sostatt ætlaði fíggjarnevndin at skerja heilar 12,5 milliónir av játtanini, sum landsstýrið ætlaði at lata til hesi trý økini.

– Hetta hevði verið ómetaliga óheppið fyri hesi trý, sera týdningarmiklu økini, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur, at verða tríggjar milliónir skornar av játtanini til Landssjúkrahúsið, kann tað føra við sær, at ráð verða ikki til at taka nýggja bygningin í nýtslu í ár.

– Endamálið við at økja játtanina til eldrarøktina munandi, var at koma burturúr afturvendandi trupulleikanum, at har ávísir tættir í heimarøktini, eitt nú reingerð, brádliga halda uppat ávís tíðarskeið, tí peningurin røkkur ikki til. Og í fjør upplivdu vit so fyri fyrstu ferð tað, at tað varð bíðitíð at sleppa upp í heimarøktina. Samstundis eru tað bæði sambýli og røktarheim, sum skulu takast í nýtslu í ár.

– Verður ætlanin hjá fíggjarnevndini fylgd, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar, tí tað fer at seta okkum í somu støðu sum frammanundan, og tað var júst tað, vit vildu sleppa burturúr.

Hann vísir eisini á, at serforsorgin fevnir um øll tey børn, sum hava serligan tørv fyri neyðini.

– Felags fyri nógv av hesum økjum er, at játtanirnar hava verið ógvuliga neyvar, og sum oftast hava tær enntá verið eitt sindur ov lítlar til at tað hevur ikki borið til at hildið tær, serliga tá ið óvæntaðir trupulleikar stinga seg upp, eitt nú í serforsorgini.

Landsstýrismaðurin sigur, at í uppskotinum hjá landsstýrinum var játtanin so mikið stór, at tað hevði sloppist undan afturvendandi trupulleikum av tí, at játtanin ikki røkkur til.

### Fær rætta skútuna uppaftur

Hans Pauli Strøm sigur, at eftir at fíggjarnevndin hevur lagt álitið fram, hevur samgongan tosað saman um tær skerjingar, sum eru gjørdar.

Og hann sigur, at hann hevur fingið lyfti um at skerjingarnar skulu strikast.

– Tað var ikki uttan orsøk, at landsstýrið setti tær játtanirnar á fíggjarlógina, sum vit gjørdu og tí hevði tað verið ómetaliga óheppið at skert játtanirnar so nógv, sum fíggjarnevndin hevur ætlað, sigur Hans Pauli Strøm.

– Eg havi fingið lyfti um, at tað, sum fíggjarnevndin hevur skorið av játtanini til tey trý kjarnuøkini hjá samgonguni, nevniliga Landssjúkrahúsinum, serforsorgini og eldrarøktini, skulu setast uppá aftur.

Hann veit ikki um tað verður uppá oyrað, at skerjingin verður sett upp á aftur.

Men tað verður í øllum førum so mikið, at økini kunnu virka soleiðis sum lanndsstýrið ætlaði tað, uttan at skula vera noydd at skerja virksemi av peningatrotið ávísar partar av árinum.

Hans Pauli Strøm sigur, at hann væntar, at tað verður gjørt soleiðis at broytingaruppskot verða sett fram, tá ið fíggjarlógin kemur til 3. viðgerð, so at sparingarnar verða settar uppá aftur.

# Heimleys í Føroyum fáa ikki tak yvir høvdið í ár

**Hans Pauli Strøm hevur sett eina nevnd at lýsa støðuna við heimleysum í Føroyum**

HEIMLEYS
*Áki Bertholdsen,*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður ikki í ár, at heimleys í Føroyum fáa tak yvir høvdið.

Tað er greitt, nú fíggjarnevndin hevur lagt fíggjarlógina fyri løgtingið aftur.

Landsstýrið hevði annars ætlað at seta tvær milliónir av til eitt heim til heimleys í ár.

Men hesa játtanina er fíggjarnevndin samd um at strika.

Nú fíggjarlógin hevur verið til viðgerðar, hava bæði fíggjarnevndin og trivnaðarnevndin víst á at hvat bústaði til heimleys viðvíkur, er onki greitt ábyrgdarbýtið ímillum land og kommunu. Tað er heldur ongin virkisætlan gjørd.

Og fyrrenn hesið viðurskiftini eru greið, ber illa til at seta pening av til endamálið, sigur fíggjarnevndin.

Tí verður játtanin strikað.



*Herbergið hjá Frelsunnarherinum hevur higartil verið tað einasta, sum heimleys í Føroyum hava havt at dúva uppá, men nú hevur Hans Pauli Strøm sett eina nevnd at lýsa støðuna*

### Støðan skal lýsast

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna –og heilsumálum, skilir grundgevingarnar hjá fíggjarnevndini.

– Tað er rætt, at tað er ongantíð staðfest, hvør hevur ábyrgdina av teimum heimleysu, sigur landsstýrismaðurin.

Men tað merkir ikki, at landsstýrið hevur slept ætlanini at útvega heimleysum tak yvir høvdið.

Men samstundis hevur hann sett ein arbeiðsbólk til at lýsa støðuna viðvíkjandi teimum heimleysu í Føroyum

Hann sigur, at kommunurnar eru við í hesum arbeiðsbólkinum.

– Hesin arbeiðsbólkurin skal lýs støðuna hjá teimum heimleysu. Hann skal lýsa, hvør skal roknast at vera heimleysur í hesum føri, hann skal viðgera spurningin um ábyrgdarbýtið ímillum landið og kommunurnar. Og at enda skal arbeiðsbólkurin lýsa, hvør myndugleiki innan almannaverkið hevur ábyrgdina av heimleysum.

Onkur kundi kanska spurt um eisini tey, bara ikki finna eina íbúð, eisini skulu roknast sum heimleys.

Tað verður neyvan, men Landsstýrismaðurin sigur, at tað hevur týdning at fáa greiði á, hvørji tey heimleysu eru.

–Tá ið vit higartil hav tosað um heimleys, hava vit mest hugsað um tey, sumi dag bara hava herbergið hjá Frelsunnarherinum at dúva uppá. Men tað kann hugsast, at tað eisini eru aðrir bólkar, sum kunnu metast at vera heimleysir og har greiða skal fáast á, hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av teimum.

Ein annars arbeiðssetningur hjá hesum arbeiðsbólkinum verður at fáa greiði á, er, hvat tað skal innibera at útvega heimleysum býli, um talan bara skal bera um at útvega teimum tak yvir høvdið og eina song at sova í, ella um tilboð um viðgerð fyri rúsevnistrupulleikum, ella onnur tilboð, skulu fylgja við, fyri at fáa heimleys burturúr teimum trupulleikum, sum tey kanska hava.



# Fundur um revsitoll í Brússell

**Føroyski umboðsmaðurin í Brúsell, Hákun Djurhuus, sigur, at tað er ikki vist, at ES longu hósdagin fer at taka endaligu avgerðina um møguligan revsitoll**

LAKSUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin var fundur í Brússell millum føroysk vinnulívsfólk og umboð fyri myndugleikarnar øðrumegin og leiðandi umboð fyri embætisfólk í ES hinumegin.

Endamálið við fundinum er at forða fyri, at ES leggur revsitoll á laks, sum millum annað verður innfluttur úr Føroyum.

Talan er um eitt bráðfeingistiltak, sum skal virka í 200 dagar, meðan ES kannar ákærur um dumping av laksi til ES-marknaðin.

Tað, sum føroysku umboðini vilja við ferðini og fundinum, er at royna at forða fyri, at revsitiltøk yvirhøvur vera sett í verk móti innflutta laksinum.

Føroysku umboðini fara at føra fram, at revsitiltøkini eru í stríð við ásetingarnar um frían handil í altjóða WTO-sáttmálanum, siga keldur, sum Útvarpið hevur tosað við.



*Teir komandi dagarnir verða avgerandi fyri føroysku laksavinnuna. – Verða 15% í verjutolli løgd á føroyskan laks, sum fer til ES, er hetta seinasti naglin í kistuna hjá alivinnuni, sigur formaðurin í Havbúnaðarfelagnum, Atli Gregersen*

### Ikki vist

ES-nevndin fer hósdagin saman við limalondunum í ES at viðgera, hvørja støðu ES skal taka í laksamálinum.

Føroyski ES-umboðsmaðurin í Brúsell, Hákun Djurhuus, segði við Útvarpið týsmorgunin, at tað kortini ikki er vist, at ES fer at taka endaligu avgerðina longu hósdagin.

Føroysku umboðini, sum fóru á fund við ES, vóru Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum og føroyski ES-umboðsmaðurin í Brússell, Hákun Djurhuus.

Sosialurin hevur skilt, at formaðurin í Havbúnaðarfelagnum, Atli Gregersen og Hans Jakku Mikkelsen, sum starvast í Vinnuhúsinum fyri Havbúnaðarfelagið, eisini eru við í føroyska ferðalagnum í Brússell.

Vit royndu fyrrapartin í gjár at fáa fatur á Hákuni Djurhuus og Herlufi Sigvaldsson, men tað eydnaðist tíverri ikki.

Á Sendistovu Føroya í Brússell vildu tey einki siga, fyrr enn Hákun Djurhuus og hansara menn vóru komnir aftur av fundinum við ES-umboðini.

Vit royndu eisini at fáa fatur á løgmanni, Jóannesi Ejdesgaard, sum var á fundi við umboð fyri føroysku laksavinnuna í síðstu viku, men hann var á tingfundi.

# Lastbilur út av við gróti

**– Teir, ið áttu bilin, syrgdu fyri, at alt grótið varð tikið uppaftur og bøurin slættaður. Hetta var imponerandi, sigur løgreglan**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri fór hesin lastbilurin, sum var fulllastaður við gróti, hálvur út av vegnum miðskeiðis í bygdini í Skálafirði.

Vakthavandi á politistøðini í Runavík sigur seg ikki minnast, hvør átti bilin, men hann var á veg gjøgnum bygdina við gróti, tá ið hendingin fór fram.



*Vegkanturin skrædnaði undan, tá ið lastbilurin, sum var fulllastaður við gróti, kom ov langt út í høgru síðu á vegnum*

– Bilurin kom ov langt út í niðaru síðu, soleiðis at vegkanturin skrædnaði undan. Hóast bilurin alla tíðina stóð á hjólunum, legði hann seg so nógv á høgru síðu, at væl av gróti fór úr lastini og oman í dyrkaða bøin.

Løgreglan sigur, at hendingin fór fram um kvøldið, og morgunin eftir varð bilurin tikin uppaftur.

– Teir, ið varaðu av lastbilinum, komu við einum rennigravara, tóku alt grótið uppaftur og slættaðu bøin. Hetta var imponerandi, heldur løgreglan, sum væntar, at eigarin av lastbilinum eisini rindaði fyri stikið, sum grótið oyðilegði.

Førarin var einsamallur í bilinum, og hann fekk ongan skaða.

## Punkteraði og fór út av vegnum




*27 ára gamli lastbilurin hjá OCD, sum punkteraði og fór niðan av vegnum týsnáttina, var bert ábyrgdartryggjaður. Førarin fekk ikki álvarsligt mein*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Førarin var einsamallur í bilinum. Eftir hendingina, føldi hann sær mein í rygginum, men tíbetur vístu kanningarnar á skaðastovuni á Landssjúkrahúsinum, at maðurin ikki hevði fingið álvarsligan skaða**

FERÐSLA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Beint fyri klokkan 01 týsnáttina fór ein lastbilur niðan av vegnum nakað norðanfyri Statoilstøðina í Skálafirði. Annað av forhjólunum á bilinum, sum var á veg út á Skálafjørðin, punkteraði. Førarin misti tamarhaldið, og bilurin endaði í veitini á ovaru síðu á vegnum.

Løgreglan í Runavík sigur einki benda á, at førarin hevði ov nógva ferð, tá ið bilurin punkteraði. Heldur ikki var talan um, at førarin var ávirkaður.

– Tíbetur var lítil ferðsla, tá ið hendingin fór fram, sigur løgreglan.

Eyðvitað kundi størri skaði verið hendur, um hetta var í ringastu ferðslu, tí lastbilurin fór niðan av vegnum í skeivari síðu á vegnum. Fór hann omanav í egnari síðu, hevði fallið hinvegin verið størri, tí hægri er omanav enn niðan av vegnum.

Førarin var einsamallur í bilinum. Eftir óhappið, føldi hann sær mein í rygginum, men tíbetur vístu kanningarnar á skaðastovuni á Landssjúkrahúsinum, at maðurin ikki hevði fingið álvarsligan skaða.

### Ábyrgdartryggjaður

Løgreglan í Runavík sigur, at kranabilar hjá OCD, sum eisini eigur lastbilin, sum fór út av, royndu at fáa bilin upp aftur úr veitini fyrrapartin týsdagin.

Áðrenn myndamaður blaðsins var á staðnum týsmorgunin, høvdu teir fingið bilin uppaftur á rættkjøl. Annars lá hann so nógv á síðuni, at tað sást undir botnin á honum.

Løgreglan veit at siga, at 27 ára gamli lastbilurin hjá OCD, sum sá út til at hava fingið fleiri snuddir, bert var ábyrgdartryggjaður.